# Skúlavígsla á Eiði leygardagin



*Leygarmorgunin verða ítróttarhøllin og nýggi partrin av skúlanum á Eiði vígd og tikin í nýtslu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Leygardagin verður skúlavígsla á Eiði. Eisini verður nýggja ítróttarhøllin tikin í brúk hendan dagin**

SKÚLAVÍGSLA
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Nýggi tilbygningurin til skúlan á Eiði verður vígdur leygardagin. Eisini nýggja ítróttarhøllin, sum bygd er saman við skúlanum, verður tikin í brúk hendan dagin.

Hátíðarhald verður á Eiði frá morgninum av leygardagin. Byrjað verður klokkan hálvgum ellivu, tá Emil Olsen, prestur, fer at víga nýggja partin av skúlanum.

Talan er um serstovur og tílíkt, sum kravt er eftir nýggju skúlalógini, sum bygt er upp í skúlan vestureftir. Hesar stovur eru sambygdar við ítróttarhøllina, sum stendur í forlongilsi av skúlanum út eftir Horni.

Eftir at prestur hevur vígt skúlan, verða røður hildnar av milum øðrum borgarstjóranum, Tordi Niclasen, formanninum í bygginevndini hjá kommununi, Edvardi Paula Ejdesgaard og ætlandi landsstýrismanninum við mentamálum, sum í skrivandi stund eitur Høgni Hoydal. Skúlabørn av Eiði fara eisini at syngja undir hátíðarhaldinum, sum verður.

Eftir sjálva vígsluna verður høvi hjá fóki at sígja skúlan og ítróttarhøllina, og aftan á verður borðhald fyri teimum, sum komin eru til hatíðarhaldið.

Tilbygningurin, sum gjørdur er, er rímiliga stórur. Skúalparturin er umleið 600 fermetrar, og høllin við teimum rúmum, sum hoyra til, er umleið 1.400 fermetrar, ella umleið 2.000 fermetrar tilsamans. Øll verkætlanin kostar umleið 20. milliónir krónur, sigur Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði.

Eiði er gomul hondbóltsbygd, og rímiligt verður eingin hallarvígsla uttan hondbóltsdystir.

Sum vanligt er við slík høvi, verða tað fortíðarinnar stóru nøvn, sum fara at vísa síni kynstur aftur.

Fyrst á skránni eru tveir dystir við gomlum leikarum. Fyrri dysturin, sum verður klokkan 17, verður millum »old girls« hjá EB og Sóljuni. Hetta eru kvinnur, sum í sjeytiárunum og har umleið spældu nógvar dystir hvørjar móti øðrum. Tó varð ikki tá spælt á linoleumsgólvi, uttan á asfalti uttandura. Bæði á Eiði og í Sandavági.

Og gamlir kenningar hjá hondbóltsspælarum á Eiði sum alla aðrastaðni í landinum eru eisini vestmenningar. Nógvar dystir hava hesir menninir spælt hvør móti øðrum, sum eftir kvinnudystin fara at spæla ein »old boys« dyst. Eb og VÍF.

Men ikki er tað bara gamla tíðin, sum verður at síggja á vølli. Eisini hevur EB mannað tvey lið við teimum yngru fólkunum, sum fara at bjóða triðju deild hjá ávikavist Kyndli og Stjørnuni av. Kvinnurnar hjá EB spæla móti Kyndli, og menninir hava fingið klaksvíkingar á vitjan.

## Pengar í luftini

**Landsstýrismaðurin við oljumálum hevur víðkað møguleikarnar at søkja stuðul frá teimum sum hava loyvi til oljuleiting undir Føroyum**

**Stuðulsmøguleikar**

Oljumálaráðið hevur gjørt víðkaða reglugerð fyri stuðul frá loyvishavarunum til vinnuliga førleikamenning, verður sagt í tíðindaskrivi frá Oljumálaráðnum.

Tað merkir, at føroyingar, sum hava hug at søkja stuðul til førleikamennandi endamál, nú hava enn betri møguleikar enn fyrr at søkja loyvishavararnar um stuðul.

Tí nú ber til at søkja um stuðul til menning innan aðrar vinnugreinar enn tær, sum beinleiðis hava við olju og gass at gera, stendur í tíðindaskrivinum frá Oljumálaráðnum.

Loyvishavararnir bundu seg í ár 2000 til at veita stuðul til førleikamenning á økinum, men nú hevur eyðun Elttør, landsstýrismaður, víðkað hesar karmar til eisini at umfata vinnugreinar, sum liggja uttan fyri sjálvt olju- og gassøkið.

Tann, sum vil vita meira um hesar møguleikar, kann leita sær upplýsingar á heimasíðuni hjá Oljumálaráðnum. Tann heimasíðan eitur: www.oms.fo

## Handverkarar spurdir

**Handverkarar, sum avlærdir eru seinastu tíggju árini fáa nú sendandi spurnablað, har teir skulu svara ymsum spurningum, sum hava við verandi útbúgvingaskipan at gera**

SPURNARKANING
*Edvard Joensen*

Yrkisdepilin hevur sent út spurnarbløð til handverkarar, sum avlærdir eru í tíggjuáraskeiðnum 1993 til 2002. Endamálið er at kanna, hvat teir halda um verandi útbúgvingarskipan.

Spurningarnir, sum settir verða, fata millum annað um skúlagongd, lærupláss og arbeiðsumstøður, sigur Yrkisdepilin í tíðindaskrivi, sum sent varð út um dagarnar.

Spurt verður eisini um aldur kyn, yrkisgrein og búðstað hjá læruplássinum, verður sagt í tíðindaskrivinum. Serliga er depilin áhugaður í at vita, hvat lærlingurin heldur um eitt nú skúlaskeiðini, lærutíðina og býtið millum lærutíð og almennar lærugreinar, stendur í tíndaskrivinum.

Kanningin, sum nú verður gjørd, er tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum, og vónar yrkisdepilin, at hon fær góða undirtøku, so úrslitið kann gerast so eftirfarandi sum gjørligt. Niðurstøðurnar frá kanningin skulu ætlandi brúkast sum grundalag undir kjakinum um yrkisútbúgvingarskipanina.

Tað skal ganga skjótt nú, tí seinasta freist at lata spurnarblaðið inn aftur er longu í ovurmorgin tann, 14. mars.

Úrslitini av kanningini verða løgd fram á árliga yrkisfundinum hjá Yrkisdeplinum. Hesin verður í ár hildin tann 26. mars.

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg



# Barnaansingin dýrkar

**Barnaansingarøkið er økt nógv seinnu árini, og lønirnar hækka eisini. Tað letur til, at tað eru orsøkirnar, at barnaansingargjaldið antin er farið ella fer upp í fleiri kommunum kring landið**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*

Í Klaksvíkar kommunu fer foreldragjaldið upp frá 1. apríl. Tað hækkar við nærum 200 krónum um mánaðin. Tað kemur fyrst og fremst av, at lønirnar fóru upp tann 1. mars, og so hevur dagrøktarumsitingin fingið játtan til ein námsfrøðing afturat.

Arbeiði við eftirlitinum við at børnini mennast á rættan hátt er vorðið ov nógv hjá bert einum at taka sær av, og tí hevur umsiting-in nú fingið játtað at fáa eitt fólk afturat.

Sigrun Vágstún er dagrøktarleiðari í Klaksvíkar kommunu, og hon sigur, at við 120 børnum í skipanini er tørvurin á einum fólki afturat stórur.

Seinast gjaldið í Klaksvíkar kommunu fór upp var, tá dagrøktarnir skiftu fakfelag. Tær eru í dag limir í Starvsmannafel-agnum, sum so hevur givið teimum ein heilt nýggjan sáttmála. Tað dýrkaði samstundis eisini ansingina tá, og nú hækkar gjaldið so enn einaferð.

Sigrun sigur, at tær kundu valt at bíða við hækkingini, men so hevði hon verið tað hægri, tí hædd skal takast fyri mánaðunum harímillum. Hon skilir væl, at summi foreldur eru ill inn á hækkingina, men hon vísir samstundis á, at dygdin eisini fer upp við gjaldinum.

– Foreldur rinda eisini fyri dygdina, sigur hon og vísir á, at flestu stovnar í Klaksvík eisini hava hækkað teirra gjald.

Sigrun greiðir frá, at tá dagrøktarnir fóru upp í Starvsmannafelagið betraði tann nýggi sáttmálin munandi um teirra arbeiðskor, og tað fegnast hon um.

– Eg haldi, at tað er avbera gott, at tær hava fingið betur kor, og at tær fáa eina betri løn. Tí at tað er eitt strævið arbeiði at vera dagrøktari, sigur Sigrun Vágstún.

Sáttmálin hjá Starvsmannafelagnum sigur millum annað, at tað er ikki loyvt einum dagrøktara at hava meira enn fýra børn undir trý ár. Eru øll oman fyri trý kann hon hava fimm. Men í til dømis Klaksvíkar kommunu leggja tey seg nú eftir, at børn undir trý ár verða í dagrøkt, og síðani fara tey í barnagarð, tá tey hava aldur til tað.

Sigrun ásannar, at tað hjá teimum, sum hava fleiri børn í ansing er ein stórur biti at gloypa, tá gjaldið fer upp. Serliga hesuferð, tí nú er tað farið upp bæði hjá stovnum og dagrøkt. Og ongin systkinaavsláttur er í Klaksvík sum er. Um hann kemur, tað veit dagrøktarleiðarin ikki at siga fyri vissu.



*Foreldragjaldið fyri barnaansing í fleiri kommunum antin er ella fer at hækka. Í flestu førum er lønarhækking orsøk til hækkingina*

*Tilvildarlig mynd*

### Hækkar aðrastaðni

Bæði í Fuglafjarðar og Runavíkar kommunu vænta tey, at gjaldið eisini fer at hækka. Dagrøktarleiðarin í Fuglafirði, Eyðgerð Petersen sigur, at gjaldið er ikki hækkað enn, men hon hevur frætt okkurt um, at dagrøktararnir møguliga fara at skifta til Starvsmannafelagið, og tað fer helst at merkja eina hækking í gjaldinum, sum í dag er 1.100 krónur um mánaðin.

Sama sigur leiðarin í Runavík, Olga Rasmussen. Hon væntar, at gjaldið fer at hækka seinni, tí at dagrøktararnir fara helst at skifta felag. Runavík og Skála eru saman, og á Skála eru dagrøktararnir limir í Starvsmannafelagnum.

– Eg vænti, at tær fara at skifta, tí tað hevði helst verið betur um allar vóru í sama felag, sigur Olga Rasmussen.

Í Tórshavnar kommunu hækkaði foreldragjaldið tann 1. januar í ár. Tað er nú 1.900 krónur um mánaðin fyri børn frá 0-3 ár í dagrøkt og 1.450 fyri børn eldri enn 3 ár. Vøggustovugjaldið í Tórshavnar kommunu er 2.400 krónur, og barnagarður kostar 1.500 krónur.

Dagrøktararnir í Tórshavnar kommunu eru limir í Starvsmannafelagnum, og tað hava tær verið í fleiri ár. Somuleiðis hækkaði gjaldið í Tvøroyar kommunu 1. januar í ár. Leiðarin, Súsanna Poulsen, sigur, at tað varð gjørt, tí tey tóku hædd fyri komandi lønarhækkingum. Dagrøktararnir á Tvøroyri og Hvalba, sum eru saman, eru limir í Føroya Arbeiðarafelag. Súsanna hevur onki hoyrt um, at tær møguliga ætla at skifta til Starvsmannafelagið.

# Reyni Service nýggj høli í Klaksvík

**Í seinasta Norðlýsið stóð grein um, at Reyni Service fer at byggja nýggjan verkstað í Klaksvík**

VERKSTAÐUR
*Berit Mohr*

**Klaksvík:** Krøvini til verkstøð eru sera nógv broytt, og nú er næstan alt í bilinum útgjørt við teldu, og tí eru krøvini til verkstøðini munandi hækkað. Tey mugu hava sera góða útgerð og arbeiðsmegi.

– Ein slíkan verkstað fara vit at byggja uppi í Borðoyavík, har undirsjóvartunnilin kemur upp. Hetta verður ein Toyota verkstaður, men hóast tað, so fara vit eisini at geva tænastu til aðrar bilar, sigur Eivind av Reyni, stjóri á Reyni Service.



*Eivind av Reyni, Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri og Hans Berg Hammer her avmyndaðir uppi við ídnaðarøkið, har nýggi verkstaðurin hjá Toyota verður*

*Mynd: Norðlýsið*

– Hetta verður ein ógvuliga stór broyting í okkara verð, nú vit fara at byggja egin hølir. Sum er húsast vit á 500 fermetrum, men við nýggju hølunum og túninum uttanum koma vit at hava umleið 2.300 fermetrar, greiðir Eivind frá. Hann ásannnar samstundis, at tað er alneyðugt at vera so nær viðskiftafólkunum, sum til ber, og tí fara tey eisini at hava framsýningarhøli á staðnum. Og harvið vónar Eivind av Reyni at aðrir føroyingar eisini fara at nýta høvi til at fara til Klaksvíkar at hyggja eftir framstillaðu bilunum, tá undirsjóvartunnilin er veruleiki.

Hans Berg Hammer hevur havt virksemið hjá Reyni Service norðuri á Stangavegi í mong ár, heilt síðani 1987. Men í 2001 tók Reyni Service yvir, og Hans Berg bleiv settur sum leiðari fyri deildini í Norðoyggjum. Og tað verður eisini hann, sum verður leiðari á nýggja verkstaðnum hjá Toyota.

Eivind av Reyni fegnast um at Norðingar hava tikið sera væl ímóti virkseminum.